Til allar tingmenn

LØGTINGIÐ

Løgtingsformaðurin

**14. mai 2020**
**j. nr.**
(at tilskila í svari)

**Viðvíkjandi tingarbeiðinum næstu tíðina**
Nú landsstýrið hevur linkað um avmarkingarnar í samfelagnum í sambandi við Covid-19, hevur løgtingsformaðurin tikið stig til, at broytingar eisini verða gjørdar í tingarbeiðinum.

Hetta merkir, at frá í dag verða hesar broytingar:

- Allir tingmenn kunnu vera til staðar í tingsalinum, men skulu í mestan mun royna at halda frástøðu og gott handreinføri v.m. samsvarandi almennu tilmælunum. Tingmenn kunnu framvegis velja ikki at koma í Løgtingið, uttan at verða skrásettir sum ikki møttir.
- Fólk, sum koma í Løgtingið í arbeiðsørindum, t.d. embætisfólk hjá landsstýrismonnum, kunnu koma inn í tingsalin í neyðugan mun.
- Myndafólk hjá fjølmiðlunum kunnu taka myndir í tingsalinum úr teimum trimum loyvdu hornunum, men skulu halda frástøðu v.m. samsvarandi almennu tilmælunum.
- Forboðið móti at loyva áhoyrarum at koma í Løgtingið stendur framvegis við, tí hesi kunnu fylgja tingarbeiðinum uttanífrá.
- Nevndarfundir verða sum vant í øllum fundarhølunum, men gjørdar og komandi innkallingar verða framvegis umvegis netið, í tann mun, at hetta yvirhøvur letur seg gera. Løgmaður og landsstýrismenn kunnu møta í nevndunum saman við upp til trimum fólkum afturat. Í Fundarhøli 1 er eisini møguleiki hjá tingmonnum at luttaka sum eygleiðarar í neyðugari frástøðu.
- Virksemið í matarhøllini verður aftur sum vant, men heitt verður á øll um at vísa størsta varsemi og at halda handreinføri í hásæti har.

Hesar reglur eru galdandi, til onnur boð koma.

Vinarliga

Jógvan á Lakjuni
løgtingsformaður

TINGHÚSVEGUR 1-3
POSTBOKS 208
100 TÓRSHAVN
TLF. 363900
FAX. 363901